# Málleyst í Luxembourg

**A-LANDSLIÐIÐ** **Fríggjakvøldið spældi føroyska A-landsliðið venjingardyst ímóti Luxembourg og endaði dysturin við málleysum javnleiki í nógva hitanum á Stade Alphonse Theis í Luxembourg. Hetta er annar dysturin á ferðini hjá landsliðnum og staðfestast kann, at einki mál kom ígjøgnum teir 170 minuttirnar, ið spælt var tilsamans**

**Tróndur Arge**

– Føroyingar byrja dystin væl og royna at leypa á, men teir skapa ongar vandamiklar møguleikar. Eftir eitt korter tók Luxembourg yvir, men heldur ikki teir megnaðu at skapa nakað serligt. Tað vóru bara tveir vandamiklir møguleikar í øllum dystinum. Í fyrra hálvleiki bjarga føroyingarnir á strikuni og í seinna hálvleiki bjargaði Gunnar Nielsen væl. Annars var dysturin einki at skriva heim um, sigur Ivan Egínsson, ið var á áskoðararplássinum til dystin.

Dysturin var leiktur á leikvøllinum Stade Alphonse Theis í býnum Hesperange, sum er ein forstaður til Luxembourg. Tað er pláss fyri umleið 3.000 áskoðarum.

– Leikvøllurin er serstakur og minnir faktist eitt sindur Savngasgarð, við tað at hann liggur á einum fjalli. Tað vóru umleið 700 áskoðarar til dystin, men hóast umstøðurnar greitt bendu á, at hetta



Mynd: Karl Vidtfeldt/FSF

var ein venjingardystur, so góvu liðini alt hvat tey áttu, sigur Ivan Egínsson.

Føroyski landsliðsvenjarin, Brian Kerr, hevði valt at byrja við Christian R. Mouritsen á álopskenda miðvøllinum og eisini Rógvi Poulsen fekk høvi at royna seg frá byrjan.

– Sum so stóð ongin føroyingur sterkari í myndini enn nakar annar, men bæði Christian R. Mouritsen og Rógvi Poulsen vóru millum teir betru, sigur Ivan Egínsson.

Hetta er fyrstu ferð, at Christian R. Mouritsen byrjar inni á føroyska landsliðnum.

– Eg haldi ikki, at Luxembourg er eitt betri lið enn Føroyar og hevði dysturin verið spældur í Føroyum, so trúgvi eg at Føroyar høvdu vunni. Nógvi hitin gjørdi tað torført hjá føroysku leikarunum og orkan var um at vera uppi hjá onkrum av teimum í seinna hálvleiki, sigur Ivan Egínsson.

Fyrsta føroyska uppgávan í undankappingini til EM12 verður longu 11. august ímóti Estlandi á útivølli.

# Sum at renna í hitarúmi

**A-LANDSLIÐIÐ** **Tá A-landsliðið fríggjakvøldið fór inn á vøllin í Luxembourg var B36 leikarin, Christian R. Mouritsen, millum teir ellivu, ið byrjaðu dystin. Tað er fyrstu ferð, at hann byrjar ein A-landsdyst fyri Føroyar**

**Tróndur Arge**

– Tað kom óvæntað á meg, at eg skuldi byrja inni. Eg roknaði bara við, at teir sum plaga at byrja inni skuldu byrja inni, men tað var deiligt at sleppa at royna seg á landsliðnum frá byrjan, sigur Christian R. Mouritsen.

Christian R. Mouritsen byrjaði á miðvøllinum saman við Fróða Benjaminsen og Súna Olsen.

– Eg spældi á álopskenda miðvøllinum og tað er eisini har, mær dámar best at spæla. Tá eg fekk bóltin, skuldi eg fyri tað mesta royna at halda uppá hann og so sjálvandi royna at skapa sum mest. Í verjustøðu var uppgávan hjá mær at leggja teirra verjukenda miðvallara undir trýst, sigur Christian R. Mouritsen um leiklutin, hann hevði í dystinum.

Eftir føroyskum mátistokki, so var tað ógvuliga heitt í veðrinum, meðan dysturin var.

– Tað var sum at renna í einum hitarúmi í fyrra hálvleiki. Hitin hevði stóra ávirkan á spælið hjá okkum og menn vóru øguliga troyttir, sigur Christian R. Mouritsen.

Tað vóru ikki nógvir málmøguleikar í dystinum og liðini høvdu torført við at skapa nakað.

– Tað er ilt at siga, hví vit skapa so lítið, men bæði liðini stóðu væl á vøllinum og tað var ein javnur dystur. Eg eri sum so ikki nøgdur við at spæla javnt ímóti Luxembourg, men tá vit hugsa um umstøðurnar, serliga nógva hitan, so var tað í lagi at spæla javnt.

Christian R. Mouritsen varð útskiftur tá eitt korter var eftir av dystinum, umframt at hann spældi allan seinna hálvleik í Sundby Idrætspark ímóti 1908 og skoraði føroyska málið.

– Vit hava nú verið saman sum eitt lið í nakrar dagar og nú kenna vit allir hvønn annan betur. Tað er ikki so ofta, at landsliðið kann savnast, so hesin túrurin kom væl við, sigur Christian R. Mouritsen at enda.

Christian skal longu í eldin aftur týskvøldið, tá B36 í seinnu hálvfinaluni vitjar í Streymnesi.

*trondur@sosialurin.fo*

# Kærkomin landsliðs-savning


Mynd: Karl Vidtfeldt/FSF

**A-LANDSLIÐIÐ** **Tað sigur Gunnar Nielsen, ið stóð í føroyska málinum, um lítlu venjingarleguna, sum føroyska landsliðið akkurát hevur verið ígjøgnum**

**Tróndur Arge**

– Vit eru sjálvdan savnaðir og sum oftast møtast vit bara tveir ella tríggjar dagar undan einum dysti. Her fingu vit møguleika at venja saman og koma at kenna hvønn annan. Høvi var eisini at møta nýggja hjálparvenjaranum, John McDonnel, samstundis sum vit arbeiddu við ymiskum, ið vit ikki vanliga kunnu, sigur Gunnar Nielsen.

Gunnar Nielsen stóð í málinum ímóti bæði B1908 og ímóti Luxembourg. Føroyar vunnu 1-0 á B1908 og einki mál kom í Luxembourg. Sostatt kom einki mál ígjøgnum hjá føroyingum.

– Eg havi spælt saman við teimum flestu, ið vóru í verjuni hesar báðar dystirnar, men tað er sjálvandi deiligt at vit fáa spælt nakrar dystir saman og koma at kenna hvønn annan betur. Fyri okkum í verjupartinum var tað gleðiligt, at vit megnaðu at halda málið reint í hesum báðum dystinum, sigur Gunnar Nielsen.

Føroyar og Luxembourg eru í sama styrkibólki og hava fyrr spælt javnar dystir. Í undankappingini til HM 2002 vóru vit í bólki saman við teimum og vunnu báðar dystirnar.

– Úrslitið var kanska ikki tað týdningarmiklasta í hesum dystinum, men vit vildu vinna hann og løgdu nógv fyri. Eg haldi ikki, Luxembourg er eitt betri lið enn vit og tað er eitt lið, vit eiga at kunna vinna á. Men tað var heitt og torført hjá okkum at spæla, so alt í alt, so eri eg ókey nøgdur við 0-0 á útivølli ímóti Luxembourg, sigur Gunnar Nielsen.

Føroyska landsliðið kom aftur til Føroyar leygarmorgunin. Komandi uppgávan hjá landsliðnum er í undankappingini til EM2012 tann 11. august, tá leiðin gongur til Estland.

*trondur@sosialurin.fo*

## Luxembourg - Føroyar 0-0

**Føroyar:** Gunnar Nielsen - Jónas T. Næs, Atli Gregersen, Jóhan T. Davidsen og Einar T. Hansen - Christian L. Holst(Christian Høgni Jacobsen 79.min), Súni Olsen, Fróði Benjaminsen (L) og Rógvi Poulsen(Bogi Løkin 68.min) - Christian R. Mouritsen(Jóan Símun Edmindsson 74.min) - Símun Samuelsen.

***Á bonkinum uttan at koma inn:*** Tórður Thomsen, Egil á Bø, Viljormur Davidsen, Atli Danielsen, Pól Jóhannus Justinussen og Jann Ingi Petersen.

